# Blankans ríma

Tað torir eingin danimann so gera,
- *gylt saðil á* -
sína systur á heiði land geva.
-*Tað vænasta vív, ið vinnast má.*

2.  Tað gjørdi meistarin Hildibrand,
hann gifti sína systur á heiðið land.

3. Sunnudagin brúður bald,
mánadagin í jarni so kald.

4. Hon sá seg aftur, hon sá seg fram,
hon sá sær ongan hjálparmann.

5. Hon sá seg upp til himmal,
har sá hon fuglar fljúgva.

6. "Hoyr tað, fuglurin brúni,
kan tú bera boð til Dúnoy?"

7. "Eg kann bera boð í hvørt eitt land,
eg kenni tín bróður Hildibrand."

8. Fuglurin fleyg so høgt í ský,
hann kom niður for Hildibrands bý.

9. Fuglurin fleyg so høgt frá træ,
hann kom niður for Hildibrands knæ.

10. "Hoyr tað, Hildibrand, vinur mín,
hjálp nú Maritu, systur tín!"

11. Hildibrand sínum borði skeyt,
tann brúni mjøður á gólvi fleyt.

12. "Tær loysið út hin blanka,
hann kann so víða vanka.

13. Tær heintið mær Blanka saðilgjørð!
hann rennur á vatni sum grønari jørð."

14. Tá ið hann kom har mitt á fjørð,
tá brast Blankans saðilgjørð.

15. Hildibrand sakk til sandar,
Blanki svam til landa.

16. Blanki skar so sára við,
tað hoyrdi Marita, í torni situr.

17. "Tað kenni eg á Blankans reyst,
nú eri eg vorðir bróðurleys!

18. Tað hoyri eg á Blankans mál,
at harra Krist gleðir mín bróðurs sál!"

19. Blanki bæði beit og sló,
tretivu mann undir hóvum tróð.

20. Tað gjørdi Blanki við síni tonn,
hann loysti Maritu sterku jarnbond.

21. "Hoyr tað Blanki, eg tali til tín:
hvat vilt tú hava fyri ómak tín?"

22. ”Tað vil eg hava fyri ómak mín,
at mynnast við tín munn so fín."

23. Hon mynti hann við munni sín,
tá bleiv hann ein riddari fín.

24. Hann myntist við hennara munn góð,
hann bleiv ein kongasonur so góð.